**Til: feløgini**

**Date:** 25.05.2020
**Ref:** VH/sk

## Krøv til skráseting av leikaralista v.m. fyri allar deildir

**Nú tá kappingarnar fara í gongd aftur, skulu allir leikarar og venjarar v.m., sum skulu verða innanfyri girðingina, tá dystur verður leiktur, skrásetast í Comet skipanini.**

Hetta er m.a. fyri at tryggja smittusporan, um onkur tilburður av korona verður staðfestur seinni.

Tað vil siga, at tá lið fer til dyst ella kapping, so skal leikaralisti verða gjørdur í Comet, og venjarar v.m. skulu eisini skrásetast til dystin ella kappingina.

Heimafelagið hevur sum ábyrgdari av kappingini skyldu til at fylgja við, um leikaralisti v.m. er gjørdur. Um ongin listi er, so sleppur viðkomandi lið ikki inn á vøllin, og kann harvið ikki luttaka í kappingini.

Heimafelagið má eisini skriva upp, hvør dømir hvønn dyst, um hetta ikki eisini verður ella kann skrásetast í Comet skipanini.

**Ongin leikaralisti = ongin dystur**

Hetta er galdandi til allar dystir og allar kappingar.

Vinarliga
**FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA**

S. Kollslíð

Sunniva Kollslíð